## Kann kosta 5 ára fongsul



Tað eru ikki tespilig tíðindi, enska blaðið Daily Mail borðreiður við í dag. Sagt verður, at enski landsliðsleiðarin Steven Gerrard kann fáa heilt upp í fimm ára fongsul, eftir at hann í dag er skuldsettur fyri harðskap og slagsmál í einum náttklubba. 28 ára gamli Liverpool liðskiparin var handtikin saman við fimm øðrum monnum nærhendis Lounge Inn í Southport tíðliga mánamorgunin. Tveir aðrir menn eru somuleiðis skuldsettir í morgun eftir hendingina. 34 ára gamli plátuvendarin Marcus McGee mátti á sjúkrahús eftir hendingina við skaða í andlitinum. Hendingin skal verða farin fram eftir at plátuvendarin ikki vildi spæla eitt ávíst lag, sum Gerrard bað um. Antin tað so kann fara at kosta heilt upp í fimm ára fongsul, er so ein onnur søga.

## Jólamaður drap 9

Hin 45 ára gamli Bruce Jeffrey Pardo drap níggju fólk um jólini. Hann var ílatin sum jólamaður, tá hann framdi hesi morðini. Løgreglan hevur síðani funnið fram til, at drápini vórðu gjølla løgd til rættis. Hann kom brestandi inn til eina veitslu jólaaftan og skjeyt níggju fólk. Ætlanin var at drepa mammuna, og hann visti, at hon var boðin við til veitsluna. Tað vísti seg kortini at hon var ikki farin, tí hon varð vorðin sjúk. Hann ætlaði at drepa enn fleiri, men gjørdi sjálvmorð áðrenn.

# Handlar selja børnum fýrverk

**Í eini roynd at eftirkanna um føroysku fýrverkssølurnar halda lógina, sum sigur, at ikki er loyvt at selja fýrverk til ung undir 18 ár, kom Sosialurin í dag fram til, at tríggjar av fýra kannaðum fýrverkssølum bróta lógina**

LÓGARBROT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Nú tað stundar til nýggjár eru hópin av sølustøðum kring landið, har fyritøkur ella ítróttarfeløg selja fýrverk. Talan er bæði um fastar handlar og um bingjur, ið eru settar upp til endamálið.

Løgreglan hevur seinastu dagarnar verið úti og vitjað fýrverkssølurnar, til tess at tryggja, at lógin um sølu av fýrverki verður fylgd.

Av politistøðini frætta vit, at tey hava ein tjekklista, sum tey ganga eftir, tá tey fara út á sølustøðini. Lógin hevur nevniliga neyvar ásetingar um, hvussu umstøðurnar skulu vera har fýrverk verður selt.

Millum annað tryggjar løgreglan sær, at:
- Roykibannið verður hildið
- At eldfimar veskur eru burturbeindar
- At bert er ein lutur av hvørjum slagi stendur frammi í handlinum
- At neyðugu sløkkiamboðini eru til staðar
- At goymslan av fýrverkinum er væl avlæst, so fólk ikki sleppur at henni
- At allir kassar við fýrverki eru væl merktir, so eingin ivi er um, at tað eru vandamikil evni í honum
- **At ikki verður selt til fólk undir 18 ár**

Sosialurin hevur í dag kannað, hvussu væl hetta seinasta verður hildið. Sleppa børn og ung undir 18 ár at keypa fýrverk, ella verða tey vend í hurðini.

### Tríggir av fýra bróta lógina

Vit valdu fýra tilvildarligar fýrverkssølur í høvuðsstaðnum, har vit fingu 15 ára gomlu Sissal at fara inn og vita, hvørt hon slapp at keypa fýrverk, ið ikki eigur at verða selt ungum undir 18 ár. Fyri ikki at gera mun á sølustøðunum, bóðu vit hana royna at keypa nøkunlunda tað sama í øllum støðunum, nevnliga tveir pakkar av »Heksehyl« og eina rímuliga kraftiga og stóra rakett.

Fyrsta vitjanin varð gjørd við Vøruhúsið á Hjalla. Har varð Sissal beinanvegin spurd um hon kundi prógva at hon var yvir 18 ár, og slapp hon sostatt ikki at keypa fýrverkið.

Næsti steðgur var við handilin 360° á Hjalla. Har sendu vit hana inn at keypa júst tað sama. Her hepnaðist tað henni at keypa tað, vit bóðu hana keypa, uttan at verða spurd um prógv.

Triði steðgurin var við bingjuna uttanfyri Hoyvíkshøllina. Har eydnaðist tað eisini Sissal at keypa fýrverk, uttan at verða spurd um prógv.

Seinasti steðgur var hjá Thomas Dam á Hálsi. Eisini her fekk hon keypt tað fýrverkið, vit bóðu hana um, uttan at nakar kannaði eftir, um hon hevði loyvi at keypa fýrverk.

Sostatt kunnu vit bara staðfesta at tríggjar av teimum fýra tilvildarligu fýrverkssølunum, ið vit kannaðu, ikki halda seinasta punktið. Spurningurin er so, hvussu støðan er við restini av sølustøðunum.










## Hevur sagt tað við sølufólkini

LÓGARBROT
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fróði Sigvardsen, handilsmaður, hevur ábyrgdina av tveimum av sølustøðunum, sum Sosialurin hevur kannað: Við 360 á Hjalla og Thomas Dam á Hálsi.

Spurdur, hvussu tað ber til, at ein ung genta sleppur at keypa eina rakett fyri 200 krónur, sigur hann seg hava sagt við sølufólkunum, at tey mugu ikki selja til ung undir 18 ár.

- Eg havi sagt, at tey mugu ikki selja annað enn smáting til ung undir 18 ár. At tey gera tað kortini, fái eg ikki vart meg fyri, annað enn at endurtaka tað aftur og aftur, sigur Fróði Sigvardsen. Hann leggur afturat, at tað serliga eru smádreingir, sum smetta fyri hvørjum øðrum, um okkurt sølustað selur teimum vørur, sum eru bannaðar. Tí er tað serliga teir, tey savna seg um.

Eisini vísir Fróði Sigvardsen á, at kann vera torført at halda skil á, tí ofra standa fleiri fólk við diskin og keypa í senn - børn fremst og foreldur aftanfyri.

- Tað er heldur ikki altíð so lætt at síggja, hvussu gomul tey ungu eru. Er tað ein seytjan ára gamal drongur, sum sær friðarligur út, so spyr man kanska ikki, sigur Fróði Sigvardsen.

- Men kanska skuldi man biðið ivasamar kundar um at vísa koyrikort, sigur hann við Sosialin.

## Ongin umbering

LÓGARBROT
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

- Hatta ljóðar ikki gott. Tað er ikki loyvt at selja til fólk undir 18 ár, og tey sum selja hava onga umbering, tí við hvørjum einasta loyvi, sum vit lata, verða reglurnar latnar á skrift. So øll sum selja, kenna lógina, er fyrsta viðmerking frá vakthavandi á politistøðini í Havn, tá vit siga honum okkara søgu.

Á trimum av fýra sølustøðum, sum vit hava vitjað í dag, vísir tað seg nevniliga, at aldursmarkið ikki verður hildið. 15 ára gamla gentan, sum Sosialurin hevur sent at kanna málið, slapp at keypa fýrverk uttan nakran trupulleika, hóast lógin sigur, at fólk skulu vera fylt 18 fyri at kunna keypa.

- Vit koyra runt til sølustøðini fyri at tryggja, at fýrverkslógin verður hildin, men vit fáa ikki staðið har allan dagin. Tá vit hava verið úti, hava vit ikki sæð nakað óreglusemi, men vit vita sjálvandi ikki hvat fer fram, tá vit ikki eru har, sigur vakthavandi.

Hann sigur, at sektin fyri at selja fýrverk til børn og ung er bót. Talan kann í serliga grovum førum gerast um hefti.

- Hatta ljóðar ikki gott, tí hatta er lógarbrot. Tað kann jú standast stórur skaði á børnini av fýrverkinum, so hatta er strangliga bannað, sigur vakthavandi.

Hann eggjar fólki til at melda tað, um tey koma fram á slíkt óreglusemi í sambandi við fýrverkssøluna.